# Hurðin gongur títt í FCK

**Næstu dagarnar fara fleiri spælarar at siga farvæl og aðrir at biðja góðan dag í stórfelagnum, sum nú er uttan føroyskar spælarar**

FCK
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsáhugaðir føroyingar mugu venja seg við, at eingin føroyskur spælari longur er í felagnum - fyribils í hvussu so er - sum tað seinastu mongu árini hevur verið sjálvsagt at taka á við.

Átta ára samstarv við Toda Jónsson kann ikki annað enn hava sannført leiðsluna í byens hold, sum felagið verður nevnt, um, at tað skal haldast eyga við møguleikanum at finna ein føroyskan spælara.

Í hesum umfarinum verður tað neyvan. Men tað er ein sannroynd, at næstu dagarnar fer hurðin í FCK at ganga títt.

Umframat siga farvæl við Toda Jónsson og Sibusiso Zuma so var tað í vikuskiftinum greitt, at svenski málverjin, Magnus Kihlstedt, ikki longur fer at umboða FCK. Málverjin hevur seinastu tíðina verið meiri skaddur, enn hann hevur verið førur fyri at venja og spæla. Tí eru felagið og svenskarin samd um, at samstarvið er lokið.

FCK skal tískil hava nýggjan málverja. Hesin sigst vera Jesper Christiansen, sum seinastu tíðina hevur spælt við Viborg. Hann er eykamálverji á landsliðnum. Fyrsta landsdystin spældi hann, tá ið hann loysti Peter Schmeichel av á Tórsvølli fyri fimm árum síðani.

Ítróttarstjórin í FCK, Niels-Christian Holmstrøm, og formaðurin, Flemming Østergaard, søgdu sunnudagin, at felagið ætlar at keypa í hvussu so er tríggjar spælarar - ein til hvørja ketuna.

At tað er neyðugt at keypa fleiri spælarar kemst av, at fleiri spælarar sigast at hava kós úr FCK. Miðvallarin Magne Hoseth skuldi í gjár samráðast við Vålerenge í Oslo. Hann hevur verið eitt ár í FCK. Tað hevur ikki treytaleyst verið dansur á rósum hjá honum, og vinstrabeinti spælarin sigst vilja sleppa aftur til føðilandið.

Sáttmálaskeiðið hjá miðvallar stríðsmanninum, Hjalte Bo Nørregaard, í FCK er lokið. Spælarin hevur ikki viljað skrivað undir nýggjan sáttmála sambært teimum treytum, sum felagið hevur bjóðað honum. Spælarin sigst hava tvey tilboð frá útlendskum feløgum at taka støðu til, og tað verður roknað við, at greiða í hesi vikuni fer at fáast á, hvar hann fer at halda fram við fótbóltsspælinum.

Ikki minst í álopspartinum er neyðugt at fáa nýggjan spælara. Umframt Toda Jónsson so er 23 ára gamli Jesper Bech, sum ikki rættuliga heldur seg hava fingið møguleikan, sum evnini áttu at havt borið við sær, er á veg úr felagnum. Eitt ár er eftir av sáttmálaskeiðnum hjá honum. FCK leiðslan hevur strongt á at fáa undirskriftina hjá unga manninum, men hann hevur ikki viljað bundið seg sambært treytunum, sum felagið hevur bjóðað.

Jesper Bech hevur verið skaddur seinastu vikurnar. Leygardagin var hann í Malmø og fylgdi heimadystinum hjá Malmø FF. Hann sat á heiðursplássi saman við formanninum í felagnum, fyrrverandi stórspælaranum Hasse Borg, og nú ganga tíðindini sum rótasúpan, at FCK álopsspælarin nú beinanvegin skal flyta um Oyrasund.

Thomas Røll, sum fyri tveimum árum síðani var í landsliðshitanum, hevur ikki verið í FCK hitanum síðani Hans Backe gjørdist venjari. Í vár hevur Thomas Røll spælt við barndómsfelagnum í Silkeborg. Hann hevur verið útleigaður. Nú verður sagt, at hann er á veg til Noregs. Fyrrverandi FCK venjarin, Roy Hodgson, er nú venjari í Viking Stavanger. Tað var hann, sum keypti Thomas Røll til FCK. Hann sigst framvegis halda nógv av miðvallaranum, sum hann ætlar at keypa frá FCK.

Roy Hodgson tykist hava stóran áhuga fyri donskum spælarum. Í vikuskiftinum gjørdist greitt, at hann hevur keypt Allan Gaarde, sum er stórur vinstrabeintur miðvallari, frá AaB og til Stavanger.

Estlendski landsliðsspælarin, Urmas Rooba, sum seinasta árið so rudduliga hevur tapt kappingina um vinstra vongverjaplássið í FCK sigst eisini at vera á veg til Viking Stavanger.

Burtursæð frá Viborg málverjanum so er enn ikki greitt, hvørjir spælarar nú skulu loysa Toda Jónsson, Zuma og allar hinar, sum eru á veg úr felagnum, av. Men eingin ivi er um, at áhugin fyri FCK og tíðindum um keyp og sølu fer at verða ógvuliga stórur teir næstu dagarnar.

# Andrew aftur á blettinum

**Leygardagin varð greitt, at Johan B. Hansen verður einsamallur føroyskur landsliðsspælari í superliguni næsta ár**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Johan B. Hansen verður einsamallur føroyskur landsliðsspælari í bestu donsku fótbóltsdeildini næsta ár. Tað varð greitt leygardagin, tá ið 30. og síðsta umfarið í næstbestu deildini í Danmark var á skránni.

Frammanundan var AC Horsens, sum leygardagin tapti 2-1 á heimavølli ímóti Vejle, flutt upp. Tapið leygardagin bar við sær, at Horsens endaði á øðrum plássi. SønderjyskE vann 4-1 á heimavølli ímóti Fredericia, og harvið vunnu teir deildina og tryggjaðu sær harvið, at superligu fótbóltur næsta kappingarár verður í Haderslev.

At SønderjyskE vann bar við sær, at tað undir ongum umstøðum bar til hjá Frem og Jón Róa Jacobsen at flyta upp. Frem spældi síðsta dystin á útivølli ímóti Køge, sum vann 4-0. Jón Rói Jacobsen var á vøllinum allar 90 minuttirnar.

Í Frem eru tey vónbrotin av, at tað ikki eydnaðist at vinna uppflyting. Samstundis ásanna tey, at liðið í løtuni neyvan er nóg væl fyri at spæla í superliguni. Hildið verður, at tað er bara málverjin og í verjan, har Jón Rói Jacobsen er millum miðverjarnar, sum eru nóg væl fyri at spæla í bestu deildini.

Fremad Amager vann næstsíðsta vikuskifti síðsta heimadystin í hesum kappingarárinum. Leygardagin vóru teir fyri síðstu ferð á útivølli, og enn eina ferð eydnaðist tað at fáa fulla úrtøku. Fremad Amager var í Gladsaxe, har teir vunnu 2-1 á AB. Andrew av Fløtum legði Fremad Amager framum, tá ið hálvur tími var farin. Eftir væl uppspælt álop og útfrá smekkaði hann í kassan.

Løtu seinni var um reppið, at Andrew av Fløtum, sum var á vøllinum allar 90 minuttirnar, økti um munin, men eftir langskot fór bólturin dygst omanfyri tværtræið. Tríggjar minuttir eftir steðgin økti Fremad Amager um munin, og stutt undan dystarenda minkaði heimaliðið um munin til 2-1.

Dalum, Næstved og B93 fluttu niður í 2. deild. Upp í 1. deild fluttu Kolding, Brabrand og Lyngby, ið hevur Christian Lamhauge Holst, sum Henrik Larsen eina ferð var í triðju bestu donsku deildini og valdi til landsliðið, í álopinum. Tað hevur gingið ógvuliga væl hjá Christian Lamhauge Holst. Næstsíðsta vikuskifti skoraði hann tvey mál í 3-2 sigrinum á Glostrup.

## Danska superligan

| | | d | v | - | j | - | t | v/m | t/m | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby (S) | 33 | 20 | - | 9 | - | 4 | 61 | 23 | 38 | 69 |
| 2 | FCK (M) | 33 | 16 | - | 9 | - | 8 | 53 | 39 | 14 | 57 |
| 3 | FCM | 33 | 17 | - | 6 | - | 10 | 49 | 40 | 9 | 57 |
| 4 | AaB | 33 | 15 | - | 8 | - | 10 | 59 | 45 | 14 | 53 |
| 5 | Esbjerg | 33 | 13 | - | 10 | - | 10 | 61 | 47 | 14 | 49 |
| 6 | OB | 33 | 13 | - | 9 | - | 11 | 61 | 41 | 20 | 48 |
| 7 | Viborg | 33 | 13 | - | 9 | - | 11 | 43 | 45 | -2 | 48 |
| 8 | Silkeborg | 33 | 13 | - | 8 | - | 12 | 50 | 52 | -2 | 47 |
| 9 | AGF | 33 | 11 | - | 6 | - | 16 | 47 | 53 | -6 | 39 |
| 10 | FC Nordsj. | 33 | 8 | - | 6 | - | 19 | 36 | 59 | -23 | 30 |
| 11 | Herfølge | 33 | 6 | - | 7 | - | 20 | 29 | 71 | -42 | 25 |
| 12 | Randers FC | 33 | 5 | - | 9 | - | 19 | 30 | 64 | -34 | 24 |

*Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)*

## Danska 1. deild

| | | d | v | - | j | - | t | v/m | t/m | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SønderjyskE | 30 | 19 | - | 7 | - | 4 | 75 | 31 | 44 | 64 |
| 2 | AC Horsens | 30 | 19 | - | 6 | - | 5 | 51 | 23 | 28 | 63 |
| 3 | Frem | 30 | 17 | - | 8 | - | 5 | 61 | 30 | 31 | 59 |
| 4 | Køge | 30 | 16 | - | 8 | - | 6 | 67 | 34 | 33 | 56 |
| 5 | Vejle | 30 | 14 | - | 7 | - | 9 | 59 | 51 | 8 | 49 |
| 6 | Skjold | 30 | 15 | - | 4 | - | 11 | 47 | 45 | 2 | 49 |
| 7 | HIK | 30 | 12 | - | 11 | - | 7 | 58 | 41 | 17 | 47 |
| 8 | Fr. Amager | 30 | 12 | - | 10 | - | 8 | 50 | 39 | 11 | 46 |
| 9 | Fredericia | 30 | 10 | - | 8 | - | 12 | 48 | 50 | -2 | 38 |
| 10 | NFA | 30 | 10 | - | 6 | - | 14 | 50 | 59 | -9 | 36 |
| 11 | AB | 30 | 10 | - | 5 | - | 15 | 49 | 52 | -3 | 35 |
| 12 | Brønshøj | 30 | 8 | - | 7 | - | 15 | 48 | 65 | -17 | 31 |
| 13 | Ølstykke | 30 | 8 | - | 6 | - | 16 | 39 | 68 | -29 | 30 |
| 14 | Dalum | 30 | 8 | - | 3 | - | 19 | 47 | 81 | -34 | 27 |
| 15 | Næstved | 30 | 6 | - | 2 | - | 22 | 30 | 71 | -41 | 20 |
| 16 | B 93 | 30 | 3 | - | 8 | - | 19 | 41 | 80 | -39 | 17 |

*Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen, Jónas Þór Næs (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)*

## Danska 2. deild

| | | d | v | - | j | - | t | v/m | t/m | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kolding FC | 30 | 23 | - | 0 | - | 7 | 63 | 30 | 33 | 69 |
| 2 | Brabrand | 30 | 18 | - | 5 | - | 7 | 57 | 29 | 28 | 59 |
| 3 | Lyngby | 30 | 18 | - | 4 | - | 8 | 67 | 32 | 35 | 58 |
| 4 | Holbæk | 30 | 17 | - | 7 | - | 6 | 63 | 35 | 28 | 58 |
| 5 | Glostrup | 30 | 17 | - | 4 | - | 9 | 65 | 44 | 21 | 55 |
| 6 | Slagelse | 30 | 13 | - | 9 | - | 8 | 52 | 36 | 16 | 48 |
| 7 | Næsby | 30 | 14 | - | 5 | - | 11 | 44 | 35 | 9 | 47 |
| 8 | Jetsmark | 30 | 11 | - | 7 | - | 12 | 53 | 52 | 1 | 40 |
| 9 | Aarhus Fr. | 30 | 11 | - | 6 | - | 13 | 47 | 42 | 5 | 39 |
| 10 | B 1913 | 30 | 9 | - | 9 | - | 12 | 42 | 50 | -8 | 36 |
| 11 | FC Roskilde | 30 | 11 | - | 1 | - | 18 | 34 | 63 | -29 | 34 |
| 12 | B 1909 | 30 | 8 | - | 8 | - | 14 | 28 | 45 | -17 | 32 |
| 13 | Hjørring | 30 | 7 | - | 9 | - | 14 | 37 | 58 | -21 | 30 |
| 14 | Kalundborg | 30 | 7 | - | 6 | - | 17 | 41 | 62 | -21 | 27 |
| 15 | Holstebro | 30 | 6 | - | 4 | - | 20 | 34 | 68 | -34 | 22 |
| 16 | Værløse | 30 | 6 | - | 4 | - | 20 | 29 | 75 | -46 | 22 |

*Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby), John Petersen (Holstebro)*

## Íslendska Landsbankadeildin

| | | d | v | - | j | - | t | v/m | t/m | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FH | 6 | 6 | - | 0 | - | 0 | 16 | 2 | 14 | 18 |
| 2 | Valur | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 15 | 4 | 11 | 15 |
| 3 | Fylkir | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 7 | 3 | 10 |
| 4 | Keflavík | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 14 | -4 | 10 |
| 5 | Fram | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 7 | 5 | 2 | 8 |
| 6 | KR | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 5 | 6 | -1 | 7 |
| 7 | ÍA | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 5 | 9 | -4 | 7 |
| 8 | _róttur | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 8 | 11 | -3 | 4 |
| 9 | Grindavík | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 4 |
| 10 | ÍBV | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 5 | 16 | -11 | 3 |

*Føroyskir leikarar: Rógvi Jacobsen (KR)*